Viðmerkingar

Viðmerking

Eg havi hildið meg til ta meginreglu ikki at skifta orð í blóðunum við prestarnar og als ikki um trúarspurningar, tí slík orðaskifti millum prestar í somu kirkju eftir míni hugsan eiga at fara fram aðrastaðni. Men greinin hja Peter O.K. Olofson presti í Dimmalætting nr. 103, 6. juli 1996, noyðir meg at gera eitt undantak. Í hesi grein verði eg til-(Mark. 10,14). Og tá ið Jesus sigur, at Guds riki hoyrir teimum til, so glatast tey ikki.

Tað er tí ein beiskur biti at svølgja, tá Olofson sigur, at míni orð merkja, -at alle børn, fødte som ufødte, er í Guds rige, *fordi de er børn*.- Nær og hvar havi eg sagt tað? Hetta er einfalt at bera falskan vitnisburð imoti næsta sínum. Børnini hoyra Guds riki tí, ikki tí teverri børn, *men tí Jesus Kristus hevur sagt tað, og hansara orð eru at lita á*. Hvi Jesus sigur tað, veit eg ikki, men hann hevur sagt tað, og og trúgvi tí, hann sigur, og haldi meg til tað. Og eg ivist onga løtu í, at hann skal siggja til, at so verður. Tað er tann trovst, eg havi borið og fari at bera menniskjum, tá koma so fyri, at tey missa børn, aðrenn tey kundu verða doypt. Og soleiðis havi eg eisini skilt tað, tá ið biskupurnir í fólkakirkjuni í altarbókunum mæla til, at just hesi orð (Mark. 10,13-16) verða lisin við jarðarferð av smábørnum, doyptum sum ódoyptum.

Eg kann leggja aftrat, at tann dag, eg ikki kann taka undir við læru fólkakirkjunnar á hesum sum á øðrum økjum, skal eg uttan hovastak og drál siga meg ur starvinum sum lærari í hesi kirkju.

Eg fari tí at biðja Peter O.K. Olofson um bæði í Dimmalættting og í Kristiligum Dagblað at taka aftur orðini um, at eg sigi, at børnini eru í Guds riki, -*fordi de er børn*.- og at eg ikki taki undir við døpslæru fólkakirkjunnar.

Torshavn
hin 8. juli 1996
Hans J. Joensen
biskupur

Markus 10,14

svar på biskoppens skrivelse i Sosialurin d. 11/7-1996 (og Dimmalætting i dag, bladstj.)

Det er en god ting, så vidt det er muligt, at føre dræftelser om trossspørgsmål internt også i folkekirken. Det er lidt mere problematisk, hvis den ene part offentligt har fremført sin lære, og trods interne dræftelser fastholder sin offentligt fremførte lære, når den er i strid med kirkens bekendelse. Diskussion for diskussionens skyld tjener ikke noget formål, men når det er afgørende og vigtige ting, der står på spil, kan det være nødvendigt at tale også selv om det letteste – på kort sigt – var at tie.

I Dimmalætting d. 8/12-1994 skriver biskop Hans J. Joensen bl.a.: »Lad de små børn komme til mig; dem må I ikke hindre, thi Guds rige hører sådanne til,« (Mark. 10,14, siger Jesus. Og disse ord kan ikke betyde andet, end at børnene – enten de er født eller ufødt – hører Guds rige til, og derfor går de ikke fortabt.« Denne forståelse af Mk. 10,14 med parallelsteder ne Mt. 19,14 & Lk. 18,16, at børnene – enten de er født eller ufødt – er i Guds rige, er almen lære i de baptistiske kirker i modsætning til bl.a. den evangeliske-lutherske kirke. Og det er afgørende ting, der her står på spil.

Carl Frederik Wisløff opsummerer i sin gennemgang af dåben evangelisk-luthersk lære og kommenterer her netop forståelsen af Mt. 19,14, der er parallelsted til Mk 10,14, idet han skriver: »Trenger barna å bli gjenfødt? Det er spørgsmålet. At baptisterne overhovedet nekter, at der er gjenfødelse i dåben, er en sak for sig – det, som her kommer i betraktning, er, at de ikke tror, barna trenger gjenfødelse. De sier nemlig, at barna hører Guds rike til ganske enkelt i kraft av det forsoningsverk, som Jesus gjorde. Først når de synder med vitende og vilje, trenger de å renses og fødes på nytt.

Og for å bevise det peker de på Jesu ord i Matt 19,14: Der sier jo Jesus, at barna hører Guds rike til, mener de. Men det står ikke slik: »Guds rike hører sådanne til,« sier Jesus. Det står altså ikke, at barna hører Guds rike til, men at Guds rike hører sådanne til. Og det er noe annet! Meningen er, at barna ikke trenger til å bli voksne for å gå inn i Guds rike, slik disciplene åbenbart trodde.

Og når vi så vender oss til Bibelen og ser, hva den lærer oss om vår faldne slekt og vår medfødte syndige natur, blir det ikke mye igjen av den tanken, at barna hører Gud til uten videre. »Det, som er født av kjødet, er kjød.« Johs. 3,6. Se også Efes. 2,3. »Vi er av natur vredens barn.« Merk: Av naturen! Altså ikke først i kraft av sine egne gjerningssynder, nei allerede ved sin medfødte syndige natur er mennesket et vredens barn. Det er en grunntanke i Bibelen, at vår slekt er borte fra Gud og fødes med ond lyst, uten trykt for Gud.« (Jeg vet på hvem jeg tror. Lunde 1971, s. 123-24).

Dersom man lærer, at Mk. 10,14 betyder, at børnene – fødte som ufødte – er i Guds rige – så må vi spørge, hvad betyder så arvesynden jfr. Den augsburgske Bekendelse artikel 2, Johs. 3,6, Ef. 2,3 osv?

Dersom man lærer, at Mk. 10,14 betyder, at børnene – fødte som ufødte – er i Guds rige – så må vi spørge, hvad betyder det så at blive dåbt?

Ifølge indledningstalen ved barnedåb i 1895 ritualet, så føres vi ved dåb og tro ind i Guds rige, og derfor siges der: »For at nu dette barn, som er undfanget og født i synd, **må se Guds rige**, om hvilket vor Herre Jesus selv har sagt, at ingen kan komme ind deri, hvis ikke han bliver født pány av vand og Ånd, så vil vi i vor Herres Jesu navn **indlemme** det ved den hellige dåb i hans trosende kirke **til at få del i** hans frelse, på den måde, han selv har foreskrevet ...« Og i takkebønnen i 1912 ritualet lyder det: »Vi takker dig, himmelske Fader, fordi du ved din enbårne Søn har givet os den hellige dåb, **hvori du gør os til dine børn og skænker os Helligånden med syndernes forladelse og det evige liv.** Vi beder dig, **tag i nåde mod dette barn**, som vi bærer frem for dit åsyn, **indlem det i dit samfund** både her og hisset!«

Dersom man lærer, at Mk. 10,14 betyder, at børnene – fødte som ufødte – er i Guds rige – så er følgen af denne lære, at arvesynden benægtes og dåben tømmes for indhold. Børnene var jo allerede i Guds rige, før de blev døbt.

At vi ikke er enige med baptister, det vidste vi godt, og derfor har konfirmander i Fuglefjord præstegæld, da de blev undervist af Haremst, der var præst her 1947-1956, skullet skrive i deres konfirmandhæfte under gennemgangen af dåben: »Bemærk i Mk 10,14 står der **ikke**, at børnene hører Guds rige til (i så fald havde Jesus intet at give), men Guds rige hører sådanne til, d.vs. er beregnet også for dem såvel som for voksne.« I de to hæfter, jeg sidder med foran mig, og som jeg har fået at konfirmander, der gik til forberedelse hos Haremst, er ordet 'ikke' i begge hæfter understreget to gange. Det var noget afgørende, der stod på spil her.

Og det er afgørende, at vi som kirke bevares på Bibelens og bekendelsens grund, og at menigheder, præster og biskop står sammen om dette. Anderledes svar er det mig ikke muligt at give på skrivelsen i Sosialurin d. 11/7-1996.

Hvad angår spørgsmålet om børn, der dør udøbt, og den trøst, kirken op igennem tiderne har givet, uden at gøre op med kirkens bekendelse, skal jeg blot henvise til, hvad jeg allerede har skrevet i Dimmalætting d. 24/1-1995 & 6/7-1996.

Peter O.K. Olofson
sognepræst, Fuglefjord

Viðmerkingar

Kommunusamanleggingin í Suðurstreymi

Hvi varð lagt saman?

Í 1992 var kommunuval, og í Argja kommunu komu 4 nýggir limir inn í 7-manna bygdaráðið, men formaðurin seinastu 2 seturnar, t.e. síðani 7. januar 1985, varð afturvaldur av meirilutanum, so æthannin mundi væl vera at halda somu kos!

Tað sást beinanvegin, at kommunan var sera illa fyri fíggjarliga. Hóast minnilutin á tvírsta fundi kravdi at fáa fulla greiðu á øllum skyldum kommununnar, so gingu bara einir 2-3 mánaðir, at ein sjálvboðin sátt við eitt byggifelag viðvíkjandi bustaðarókinum á Hamrinum kom undan kavi. Sáttin segði, at A.K. fra 1. januar 93 til 1. juli 93 skuldi gjalda byggifelagnum 2.38 mill. kr. Hetta visti seg at vera dropin, tí fekk bikarið at flóta yvir. Roynt varð at loysa málið við einari umfigging, so at kommunan kundi hóra undan, men illa gekst, og ikki slapst undan sjálvbodnu sáttini. Harumframt var meginparturin av kommunuskattinum bundin í transportum til langevarar, og at enda kom so mangandi manking í skattamótoku, tí bottafall var komið á alt samfelagið.

Tað gjørdist tí púra greitt, at hetta fór at enda galið. Tá ið summarið 93 fór at halla, vuksu trupulleikarnir hjá A.K. ógvuliga skjótt. Kommunan var ikki fór fyri at halda sínar skyldur.

Alt virksemi í kommununi helt uppat, arbeiðsfólk og dagróktarmammur uppsagd, og um reppið at barnagarðurin varð stongdur með alla, men við hjálp frá Gudi og góðum fólki/starvsfólki, eydnaðist at hava hann opnan alla tíðina 'at kalla', meðan kreppan stóð við.

Skuldin til Tórshavnar Kommunu fyri veitingar og onnur leysaskuld vaks, og eingin loysn í evgsjón. Skilið í kommununi frættist víða, og kundi avirka lánveitararnar, t.d. kann nevnast, at eitt 30 mill. lán hja A.K. (Baltica Bank) kundi gerast trupult at endurfiggja 17. sept. 93 boðaði bygdaráðið byráðnum frá, at eingin peningur var at gjalda fyri tænastur í Tórshavnar kommunu og í KOB, og byráðið svaraði aftur við at siga, at samstarvið viðvikjandi bussleiðini, slókkilíðnum og tannroktini hjá skúlabørnunum helt uppat frá 1. okt. 93. Ruskinnsavingin helt eisini uppat.

Nú voru góð ráð dýr. Farið varð so langt sum at taka kommununa lýsta á húsagang, men heldur ikki tað bar til, sigði landsrættarin. Nú stóð kommunan skak og mat. Vit vóru úti í Tinganesi at fáa landsstýrið at leggja pening út fyri tey allarnevndugastu tingini í kommununi, t.d. gjald fyri olju, el og renovation. Bygdaráðið mundi skilja, at mguleikarnir at bjarga kommununi fekk aðvist í storum. Tað vóru helst bara 2 møguleikar at velja í: Í kovra skattaprosentið í topp, men so rókna við at missa nógvar skattarbogarar til grannakommununa, og hvat so? 2) ella royna at fáa í lag samanlegging við Tórshavnar kommunu.

Tankin um samanlegging hevði verið nevndur nakrar ferðir so hissini tá fyrstu tíðina, men ikki viðgjørdur sum mál.

Á fundi í bygdaráðnum 8. nov. 1993 var eftir uppskoti fra 5 bygdaráðslimum samtykt at seta seg í samband við Tórshavnar bygdaráð til tess at kanna møguleikarnar at leggja kommunurnar saman. Ein serlig samráðingarnevnd var eisini vald. Byráðið tók beinanvegin undir við hesi áheitan.

Fyrsti samráðingarfundur varð 18. nov. 93. Mótparturin var fíggjarnevndin hjá býráðnum við býráðsformanninum á odda. Kári D. Petersen, advokatur, var ráðgevi ella uppmaður og greiddi tað løgfrøðisliga úr hondum. Vit løgdu so okkara sjónarmið – ella rættari sagt krav – fram, men komu skjótt niður á jørðina aftur, hvørki lítið ella einki at halda um. Tað hjálpir lítið hjá tí fjørtráðu at seta trevir! Samráðingarnar fordu kortini til eitt uppskot um samanlegging,ið 29. nov. 93 var einnæst samtykt av bygdaráðnum og 2 ella 3 dagar seinni eisini einmælt samtykt av býráðnum.

Høvuðsinnihaldið í sáttmálanum var, at báðar kommunurnar skuldu starvast sum ein kommuna við somu umsiting og fíggjarlóg frá 1. jan. 1994, men endiliga samanleggingin mátti bíða til 1. januar 1997, tá ið eitt nytt felags valt býráð tekur við styrinum av samanløgdu kommununi.

Tað var sera umráðandi at fáa samanleggingina góðkenda, aðrenn fíggjarlógin fyri 1994 var avgreidd.

Tað eydnaðist, men ikki vóru stundir at hugsa um at senda avgerðina til fólkaatkvøðu. Tað kundi verið áhugavert fyri eftirtíðina, men bygda og býráðið høvdu heimild at taka hesa avgerð, sum at enda var staðfest av landsstýrinum. Her skal leggjast afturat at bygdaráðið skipaði fyri kunnandi fundi um støðuna í kommununi um tað mundið, tá ið vit høvdu boðið um samráðingar, so allir borgarar í kommununi høvdu høvi at siga sína meining um støðuna.

Nú er so mikið fralíðið, at til ber at gera sær eina mynd av støðuni, og tað er eingin ivi um, at vit gjørdu rætt at fremja samanleggingina, bæði tá ið hugsað verður um støðuna, kommunan var í, men ikki minst um tað, *ið liggur fyri framman*.

Av fyrimunum kunnu nevnast, at bygdin sum partur av einari størri kommunu hevur fingið eina sterri vælvirkandi og árvakna umsiting, sum er nakað heilt nytt fyri okkum, ið her búgva. Skattaprosentið liggur – eftir umstøðunum – á einum rimiligum stoði. Hamarin er bæði gyrdur og astaðteraður. Stórur partur av brimgarðmum laðaður av nýggjum og er nú eitt pryði. Skulin komin undir blokkskipanina, og hevur ongantið havt tað so rumt fíggjarliga, t.d. kann nevnast, at í 1995 vóru bráðneyðugar ábøtur og umvælingar á bygdarskúlanum gjørdar fyri meira enn 700.000 kr. Ymsar ábøtur – smærri og størri – her og har á vegakervið, men alt kann ikki gerst samstundis, tí vit eru ju ikki einsamøll. Harafturat gevur samanleggingin okkum fullan rætt til allar tænastur í Tórshavnar kommunu, t.d. slókkiliðið, skúlabarnatannroktina, leikvøllir, býarbókasavnið, kirkjugarð, margarínfabrikkina, renovatiónina, havi helst gloymt okkurt, men eisini okkurt annað arbeiði, ætlanir, eru í undirbúna, men skal ikki avdúka nakað nú.

Aftur imóti hesum verður kanska fórt fram, at nærdemokratið (?) er offrað, men har eri eg als ikki samdur. Tað er ilt at fáa eyga á nakað minus við samanleggingini, um ein skal royna at vera sannur imóti sær sjálvum. At rætta avgerðin var tikin, sæst m.a. av tí, at eisini nólsoyingar eru sinnaðir at leggja saman, og lukkutíð fyri okkum sleppa vit tá at biða í óvissu eftir landsstýri og løgtingi, tí tað kann gerast seinur dagur, áðrenn myndugleikarnir eru til reiðar við einari kommunusamanlegging ella kommunuumskipan.

»Mens græsset gror, dør horsemor«, plagar Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, so visiliga at taka til.

Tað er sjálvandi rætt, at vit hava aktið okkum eyka skyldur t.d. part í yvirtøkuni av KOB, men soleiðis má tað vera í einum góðum hjunalagi.

Vit eiga nú at hyggja frameftir fyri einaferð og seta út í kortið av nýggjum. Frá 1. januar 1997 verða vit borgarar í Tórshavnar kommunu, og má og skal hugsunarhátturin samsvara við henda veruleika. Tá ið eg haldi, at tað er fyri neyðini at lita frameftir, so meini eg kortini ikki, at alt tað farna skal gloymast. Tað eru so mong *hit* fra áttati árunum í A.K., ið skattgjaldarin ongantið fekk svar uppá. Stutt sagt: Hvi fór Føroya ríkasta kommuna á heysin? Í allum okkara frankomnu grannalondum hevði verið kannað og svarað; alt annað hevði verið ósømiligt og óhugsandi.

Tað góða støði, ið er lagt hesa setuna, skal nýtast við skili og hegni til frama fyri allar borgarar í Tórshavnar kommunu, sum heitið á samanløgdu kommununi verður.

Í heyst skulu argjafolk, norðradals- og syðradalsfólk fyri fyrstu ferð vera við at velja umboð í Tórshavnar býráð saman við borgarum í Havn, Hoyvík, Hoydølum, Hvítanesi, Kaldbak, Norðasta Horni o.ø.fr.

Valið kemur at standa imillum skynsemi, hovligan framburð og samstarv øðrumegin, og hinumegin trongdina at ugga seg við at venda aftur til gamla skilið. Tað valið skuldi ikki verí trupult!

Regin av Steinum
bygdaráðslimur

Risafyritøkur bora í Føroyum

Sjálvt um boringin í Lopra bert kostar 28 milliónir krónur, so eru tað risastórar altjóða fyritøkur sum eru við í projektinum.

Nakrar av teimum stóru eru Esso, Phillips, Statoil, BP, Mobil og Norsk Hydro. Norsk Hydro, sum ikki er tann største, umsetir fyri nærum 80 mia. krónur árliga. Yvirskotið var 10,7 mia. krónur í fjør.

LEIF LAADAL

Vanligur framferðarháttur í sambandi við olju- og gassboring, er tann, at tey ymisku feløgini skipa seg í tað teir rópa »konsortier«. Eini fýra-fimm feløg fíggja vanliga eina boring sum ta í Lopra, men í hesum føri eru heilar 19 fyritøkur við.

Møguleikin fyri at fáa ágóða fyri fíggingina av boringini í Lopra er ikki stórur. Hetta er orsøkin til at so nógv feløg eru við í Lopra-verkætlanini.

Hvi fíggja

Arne Rosenkrands Larsen, sum er projektleiðari hjá Dansk Olje og Naturgas, sigur, at fyritøkurnar keypa rættin til upplýsingar, fyri at kanna sær innlit í hvussu oljustøðan er kring Føroyar. Hesir upplýsingar kunnu vera hentir, tá ið útlistering – tað er útbjóðing av rættindum til at vinna olju í Føroyum – skal gerast, vónandi einaferð í 1997.

Eingir trupuleikar hava verið við at finna feløg til at fíggja boringina í Lopra. Oljuboringin í Føroyum hevur stóran altjóða áhuga. Feløgini vanta at fáa nýggjar upplýsingar í sambandi við boring av so tjukkum basalti, og tá ið almennir myndugleikar sýna boring so stóran áhuga sum Føroyskir hava gjørt, er hetta við til at feløgini kenna seg trygg við sína ílegu.

Arne Rosenkrands Larsen leggur tó dent á, at um olja verður funnin í Føroyum, so eru tað føroyskir myndugleikar sum eiga allan rættin til hana. Einki av teimum 19 feløgunum hava fingið rættindi til annað enn at hyggja og kanna.

Tíðin er búgvin

At bora eftir olju í økinum millum Føroyar og Hetland er ikki so lætt. Longu fyri 20 árum síðani funnu bretar eina stóra oljugoymslu norðan fyri Hetland, men av tí at basaltlógini har eru so tjukk, er ikki rættlig framleiðsla komin í lag enn.

Tøknifrøðin er nógv broytt hesi seinastu 20 árini, og hetta ger áhugan fyri Føroyum enn størri. Nú ber til at bora tað tjukka basaltið og um stórar oljugoymslur eru kring Føroyar, er ikki so hopuleyst at fáa oljuna upp.

Føroyskar fyritøkur royna seg í oljuvinnuni

Av teimum 23 feløgunum, sum hava verið við til at gera klárt, og sum skulu bora, eru 18 prosent føroysk.

LEIF LAADAL

Ein stórur partur av tí arbeiði, sum verður gjørt í Lopra, verður gjørt av føroyskum fyritøkum.

Vit hava roynt at fáa so nógv føroysk feløg við sum gjørligt, sigur Arne Rosenkrands Larsen, projektleiðari hjá Dopas.

Føroyingar bjóðaðu uppá arbeiðið á jøvnum føti við útlendskar fyritøkur, og eingin fekk serviðgerð, leggur hann aftrat.

Strandferðslan við

Ein av teimum føroysku fyritøkunum, sum skal arbeiða við boringini í Lopra, er Strandfaraskip Landsins.

Økið, sum Strandferðslan fær, er »Base & Transport«. Ein partur av arbeiðinum hjá Strandferðsluni er at syrgja fyri, at ymiskt tilfar, sum skal brúkast á økinum í Lopra, kemur til Suðuroynna sum skjótast.

Hin føroyski hátturin

Vit mugu venja okkum til, at føroyingar ikki hava drúgvar royndir innan oljuvinnu, sigur Hans Rieter, sum er »Drilling supervisor« á økinum.

Hann sigur, at framferðarhátturin í oljuvinnuni er, at tilfarið skal vera til taks sum skjótast. Hetta hevur við sær, at har borað verður eftir olju, skal tilfarið vera á økinum longu sama dag, og í seinasta lagi dagin eftir. Í Føroyum hava teir havt trupulleikar við, at teir skulu bíða ov leingi eftir tilfarinum.

Um tú skal hava onkran smálut til Lopra, skal tú fyrst ringja og bileggja. Síðan skal tú ringja dagin eftir fyri at tryggja tær, at luturin er á veg. Hereftir kunnu ganga tveir dagar, áðrenn tú hevur lutin, sigur Hans Rieter.

Hann leggur tó aftrat, at arbeiðið við at gera klárt at bora, ikki hevur verið stórvegis tarnað av tí føroyska arbeiðsháttinum.

– Ein skal bert venja seg við, at tað kunnu ganga nakrir dagar meira enn vanligt, og so arbeiða við hesum í tonkunum.

Føroyingar kappingarførir

Tað, at føroyskar fyritøkur fingu ein part av arbeiðinum í Lopra, vísir, at tær eru áhugaðar og kappingarførar.

Tey arbeiði, sum føroyingar hava fingið, eru hesi.

Verkfrøðingur á boriøkinum: Landsbyggifelagið, umhvørviskonsulentur: Landsbyggifelagið, dieselolju leverandør: Føroya Shell, entrepenør: Árni T. Brattaberg, lokal-transport: Martin Garðalíð, ÍRF-Tvøroyri og AVIS-Tórshavn og Base & Transport: Strandfaraskip Landsins.